# Føroyar í altjóða orkuveitingarhøpi

**Mándagin verður almennur fundur um orkupolitikk á Skúlaheiminum í Havn**

ORKUPOLITIKKUR

– Hvussu standa Føroyar seg í einum altjóða orkuveitingarhøpi?

Soleiðis spyr Havnar Framburðsfelag, sum mánakvøldið skipar fyri almennum fundi um vatn-, streym- og vindorkumøguleikar í Føroyum.

_ Vit kunna í 2005 staðfesta, at Føroyar enn í stóran mun, ella næstan heilt eru tengd at fossilum brennievnum, her verður hugsað um elframleiðslu, upphitan, flutning og ikki minst skipaflotanum, sigur fólkafloksvalfelagið í Suðurstreymoy í tíðindaskrivi.



Felagið sigur, at eitt av vandamálunum er, hvussu vit fara um okkara umhvørvi, vitandi at útlátið frá fossilum brennievni hevur skaðiligi árin á umhvørvi og elvir til skaðiligar veðurlagsbroytingar. Í hesum sambandi ber til at spyrja, um hetta nú er so umráðandi hjá okkum at hugsa um, tí vit eru jú so fá, og tað ger valla nakran mun, hvat vit enn halda ella gera, tá ið samanum kemur.

– Vit hava øll ábyrgd. Fyrilitið fyri umhvørvinum er fyrst og fremst at minka CO2 útlátinum, og harnæst at nýta náttúrliga tilfengi á skilabesta hátt, saman við nýtslu, nýhugsan og menning av umhvørvisvinarligari orku, sigur felagið.

Í øðrum londum verður ein alsamt størri partur av allari orkunýtslun framleidd av vind- og vatn-orku.

Skoytast kann uppí, at hetta ikki altíð verður gjørt, tí tær eru beinleiðis lønandi, men tí at ásannað er, at okkurt eigur at verða gjørt við atliti til umhvørvi.

Eitt annað er, at Føroyar eru so tengdar at influttari olju og harvið viðbreknar, tá oljuprísurin hækkar, at tað førir stórar samfelagstrupulleikar við sær.

Almenni fundurin, sum Havnar Framburðsfelag skipar fyri, verður mánakvøldið kl 20 á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin í Havn. Við á fundinum verða m. a. Klæmint Weihe fyri orkufelagið SEV og Johan í Niðristovu fyri Sp/F Røkt.

# Ábyrgd fyri egnari heilsu

**Í dag, leygardagin kl 10:30 skipar Tilhaldið í Tórsgøtu fyri einum almennum evnisdegi, nevndur »Ábyrgd fyri egnari heilsu« í Útvarpshøllini**

ELDRAMÁL

Sameindu Tjóðir lýstu árið 1999 at vera ár teirra gomlu. Í hesum sambandi var eisini her á landi gjørt rættiliga nógv burtur úr hesum tiltaki. Endamálið var at skapa betri fatan í samfelagnum fyri teimum avbjóðingum, sum tann vaksandi bólkurin av fólki, ið farin er um pensjónsaldurin, setur bæði til samfelagið og til tey sjálv.

Somuleiðis samtykti sosiala nevnd hjá kommununi í 1996 at seta ein arbeiðsbólk, hvørs arbeiðssetningur var at koma við uppskoti um, hvønn eldrapolitikk kommunan eigur at føra. Og í samband við »Altjóða eldraárið« 1999, kom so "Eldraálitið" hjá Tórshavnar kommunu.

Í oktober 2000 setti landsstýrismaðurin í almannamálum ein arbeiðsbólk at gera eina lýsing og meting av eldraøkinum. Í 2002 kom úrslitið av arbeiðinum. Álit um eldraøkið.

Politiski málsetningurin í álitunum er við grundarlagnum í meginreglunum hjá ST. Høvuðsboðskapurin hjá ST er, at øll lond eiga at stremba eftir einum samfelagi fyri allar aldursbólkar. ST áleggur heimsins stjórnum at taka niðanfyri standandi meginreglur til eftirtektar og gera tær til lógarfestan part av almannapolitikkinum skjótast til ber. Rættur teirra gomlu er í høvuðsheitum: Sjálv-bjargni, luttøka, umsorgan, menning og sjálvsvirði.

Hesi seinnu árini er talið á fólkum yvir 65 ár vaksið í stórum, og livitíðin gerst longri og longri. Stundum hoyra vit henda aldursbólk umtalaðan sum eitt vandamál í samfelagnum. Hetta man helst koma av, at útreiðslurnar til eldraøkið eru skjótt vaksandi, tað veri seg til pensjónir, ellis- og røktarheim, sjúkrahúsviðgerð, heimahjálp o.s. fr. Henda myndin gongur aftur í øllum tí framkomna Vesturheiminum.

Tað er væl skiljandi, at tess fleiri røktarkrevjandi fólk, ið verða, tess størri gerast útreiðslurnar fyri samfelagið bæði til røktarheimspláss og til rakstur av heilsuverkinum. Orsøkirnar til, at fólk gerast óhjálpin kunnu vera so mangar. Ein av teimum eru tær sjúkurnar, sum standast av vælferðarliviháttinum.

Tilhaldið í Havn er eitt av teimum støðunum, har roynt verður at gera teimum gomlu ein møguleika fyri at fáa eitt ríkari innihald í gerandisdagin, eftir at tey eru farin út av arbeiðsmarknaðinum. Grundstøðið í arbeiðinum í Tilhaldinum eru meginreglarnar hjá ST. Við meginreglunum hjá ST í huga fór Tilhaldið undir átakið »Ábyrgd fyri egnari heilsu 2004«.

Vit heittu á átta fólk, sum í sínum starvi hava serligar førleikar fyri at lýsa hetta evnið hvør úr sínum sjónarhorni. Á henda hátt vóna vit at hava sett eitt orðaskifti í gongd, sum kann vera við til at motivera gomul eins væl og yngri til at umhugsa sín lívsháttt og gera sítt til at fáa ein so heilsugóðan aldurdóm sum gjørligt.

Nevndin í Tilhaldinum er á einum máli um, at henda vitanin ikki bert skal koma okkum havnaborgarum tilgóðar. Tí skipar Tilhaldið í Tórsgøtu fyri einum almennum evnisdegi »Ábyrgd fyri egnari heilsu« í Útvarpshøllini leygardagin 29. okt. 2005 kl. 10.30-16.30.

Tilhaldið heilsar øllum hjartaliga vælkomnum.

# Eivør fær gott ummæli í Berlingske Tidende

*»…her var en stemme, hvis volumen, register og emotionelle dybde var imponerende og helt klart hørte hjemme på en scene for stor vokalkunst«, skrivar BT um framførsluna hjá Eivør Pálsdóttir í Operaini í Keypmannahavn*

Mynd: Símun J. Hansen



Tá Eivør og Danmarks Radio Big Band spældu konsert í Operahúsinum á Hólminum í Keypmannahavn í seinastu viku, var Berlingske Tidende á staðnum, og ummælið er frálíkt.

Ummælarin skrivar, at konsertin við Eivør var væl meira gjøgnumførd enn tann hjá Caroline Henderson, sum spældi áðrenn Eivør. Hetta hóast tónleikurin hjá Eivør neyvan passar inn í nakra genru. »Her var sange som primært var sangerindens egne, og som havde mærkbare rødder i et urgammelt nordisk, samisk og keltisk musikunivers.«

Røddin hjá Eivør verður somuleiðis tikin fram: »…her var en stemme, hvis volumen, register og emotionelle dybde var imponerende og helt klart hørte hjemme på en scene for stor vokalkunst.«

Eisini Danmarks Radio Big Band fær góð orð við á vegnum, útsetingarnar av løgunum hjá Eivør fáa nógv rós, og góða handalagið og innlivingin hjá tónleikarunum í Danmarks Radio Big Bandi verður eisini nevnd.

**nud**

# Danir spældu danskan tónleik

Í gjár helt danski tónleikaídnaðurin í samstarvi við Danmarks Radio »Spil Dansk Dag«, tiltakið, sum er tað fimta av sínum slag, verður hildið um heystið. Henda dag spælir Danmarks Radio einans danskan tónleik, og skipað verður fyri konsertum og tónleikatiltøkum kring alt landið.

Í ár vóru ikki færri enn 700 tónleikatiltøk, millum annað felagssangur á skúlum og í ymiskum felagskapum. Sambært dr.dk høvdu ikki færri enn 68.000 bólkar, skúlar og felagskapir meldað seg til felagssangin, ið varð sendur á P2 og P4 í gjáramorgunin. Tað var Radio Underholdnings Orkestret og DR Radiopigekoret, ið spældu og sungu fyri.

Orsøkin til »Spil dansk dagen«, er ein roynd at breiða kunnleikan um danskan tónleik í egnum landi.

**nud**